# Markoni røkkur um alt




Radio- og sjónvarpshandilin Markoni í Sverrisgøtu 9 í Havn byrjaði í 2001, og síðani oktober í 2004 hevur Jóannes Brøðraberg átt hann. Hann arbeiðir sjálvur í handlinum, og fyri trimum mánaðum síðani fekk hann ein lærling afturat sær.

Navnið Markoni er gamalt navn í Føroyum, tí tann gamli útvarpssendarin var av tí slagnum, men tað, sum fæst í handlinum í Sverrisgøtu, er alt av nýggjasta slagi. Handilin er ein sokallað Panasonic-støð, og høvuðsdenturin verður eisini lagdur á ymisk tól av tí merkinum so sum sjónvørp, stereoskipanir til heimið og til bilin.

Í dag keypa fólk næstan bara sjónvarp við flatskermi, og í Markoni kunnu fólk t. d. fáa eitt nútímans Panasonic sjónvarp við 32 tumma flatskermi fyri 6.895 krónur. Tað er eisini HD ready. Men Markoni hevur eisini sjónvørp av øðrum sløgum, og tí ber til at fáa eitt 21 tumma sjónvarp við flatskermi fyri 3.895 krónur. Jóannes Brøðraberg sigur, at teir hava selt fleiri sjónvørp og stereoskipanir nú upp undir jól.

Men Markoni hevur ikki bara tað, sum vísir myndir ella gevur ljóð. Handilin hevur eisini øll vanlig elektrisk húsarhaldstól so sum hondmiksarar, mikroovnar og annað. Tíverri er ikki pláss fyri hvítvørum í handlinum, men skalt tú hava eina vaskimaskinu ella ein komfýr, kann handilin útvega tað.

Hóast Markoni er í sjálvum hjartanum í høvuðsstaðnum, hevur handilin kundar um alt landið.

























